**Bjørg Hentze**

**Fra:** Tóri Højgaard <tori.hojgaard@gmail.com>
**Sendt:** mikudagur, 17. desember 2025 22:36
**Til:** Jákup Andrias Kristiansen
**Cc:** jakup@jakup.fo
**Emne:** Re: Til ummælis: Uppskot til løgtingslóg um bráðfeingis bústaðir og serreglur á almannaøkinum fyri burturriknar ukrainar

Góði Jákup Andrias

Sum kunnugt, so hevur stýrið fyri Føroya Barnaheim gjørt sáttmála við Kirkjuligu Heimamissiónina um leigu av bygninginum, ið vanliga verður róptur "Barnaheimið". Men stýrið og Heimamissiónin hava avtalað, at um so er at Føroya Landsstýrið framhaldandi ynskir at leiga partar av bygninginum til at húsa burturriknu ukrainunum, so er man sinnaður at leingja leigumálið.

Stýrið hevur ikki aðrar viðmerkingar til lóggaruppskotið.

Vegna stýrið

Tóri Højgaard,
formaður

On Fri, 21 Nov 2025 at 14:43, Jákup Andrias Kristiansen <jakupA@ammr.fo> wrote:

> **Til ummælispartarnar**
>
> Viðfest verður sent tykkum til ummælis:
>
> Uppskot til løgtingslóg um bráðfeingis bústaðir og serreglur á almannaøkinum fyri burturriknar ukrainar.
>
> *Yvirskipað um lógaruppskotið:*
>
> Landsverk fær við lógaruppskotinum greiða heimild at útvega bygningar og hølir at leiga út sum bráðfeingis bústaðir til burturriknar ukrainar, sum ikki hava annan hóskandi bústað, og at gera bústaðirnar klárar og halda teir við líka. Landsverk fær við uppskotinum eisini heimild at áseta serstakar leigureglur (uppskotið ásetur, at leigulógin ikki verður galdandi fyri leigumálini) og skilhaldsreglur fyri leigumálini. Bráðfeingis bústaðirnir verða skipaðir sum felags bústaðir – sum eitt slag av búfelagsskapi – har einstaklingar og familjur sum meginregla fáa hvør sítt kamar/kømur, men mugu deila køk, ves og onnur felagshølir saman við øðrum persónum.

Almannaverkið fær við uppskotinum heimild at seta ein sosialan samskipara, sum burturav skal taka sær av at hjálpa persónunum í bráðfeingis bústøðunum, ella at gera avtalu við ein uttanhýsis part um at veita hesa tænastuna, ella part av hesi tænastu, vegna Almannaverkið. Við uppskotinum fær landsstýrisfólkið í almannamálum harafturat heimild at serreglur um barnaískoyti, uppihaldsveiting, arbeiðsbúgving og virknisvenjing til burturriknar ukrainar.

---

Møguligar viðmerkingar skulu sendast til ammr@ammr.fo við cc til jakupa@ammr.fo.
Ummælisfreistin er fríggjadagin 19. desember 2025.

Vinaliga / Sincerely

Jákup Andrias Kristiansen

*Fulltrúi / Head of Section*

Almanna- og mentamálaráðið/Ministry of Social Affairs and Culture

Eirargarður 2 • 100 Tórshavn • Faroe Islands

Tel. +298 304000 • Direct +298 257013

**jakupa@ammr.fo • https://www.ammr.fo/**